# Miðlatøkningur til Kringvarp Føroya

**Kringvarp Føroya søkir eftir einum miðlatøkningi. Talan er um eitt fast starv fulla tíð.**

**STARVIÐ**
Sum miðlatøkningur verður tú partur í einum toymi á deildini Aktuelt við fotografum og klipparum, sum m.a. arbeiða við tíðindum og ítrótti. Arbeiðsøkið er innan foto, redigering, ljóð og at standa fyri framleiðslum á ymiskum sjónvarpspallum. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og skipaðar í vaktum.

**KRØV**
Tú skal vera útbúgvin innan fjølmiðlar og hava royndir frá fjølmiðlum, ella hava útbúgving og arbeiðsroyndir, sum kunnu javnmetast. Tú skal hava góðar tøkniligar førleikar og duga grundleggjandi telduforrit. Hevur tú royndir við at framleiða sendingar, er tað ein fyrimunur.

**VIT BJÓÐA:**
- Eitt spennandi, avbjóðandi og mennandi starv í einum kreativum umhvørvi.
- Eitt starv, sum tú kanst seta tín dám á.
- Eitt starv, sum gevur tær innlit í føroyska samfelagið

**VIT VILJA**
- At tú duglr at skipa arbeiðið væl, soleiðis at ásettar tíðarætlanir halda.
- At tú ert kreativ/ur, hevur gott hugflog og kann geva títt íkast á redaksjónunum.
- At tú ert kvik/ur og megnar at arbeiða undir trýsti.
- At tú hevur góð samstarvsevni, ert tolin og kann arbeiða undir skiftandi arbeiðsumstøðum.
- At tú ert eitt jaligt og arbeiðssamt starvsfólk, sum brennur fyri at siga ta góðu søguna.
- At tú hevur áhuga fyri samfelagsviðurskiftum.

**SETANARVIÐURSKIFTI**
Talan er um fulltíðar starv, sum verður sett eftir sáttmálanum millum Starvsfelagið og Fíggjarmálaráðið. Tann, sum verður settur í starv, má tola broytingar í starvsinnihaldi. Royndartíðin er tríggjar mánaðir.

**UMSÓKNARFREIST**
Umsókn við CV, prógvum, viðmælum og viðkomandi skjølum, skal sendast til umsokn@kvf.fo í seinasta lagi 27. mars 2023. Merk teldupostin “Miðlatøkningur” í evnisrútin. Skrivliga tilfarið skal sendast sum ein samlað PDF fíla.

**UPPLÝSINGAR**
Vilt tú hava meira kunning, ert tú vælkomin at venda tær til Georg L. Petersen, deildarleiðara á Aktuelt, telefon 296512 ella teldupost georg@kvf.fo., ella Bjarnheðin í Hoyvík, leiðandi framleiðara á Aktuelt, telefon 296655.

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Kringvarpsstjórin stjórnar stovninum við tilvísing til stýrið, ið telur sjey limir. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum. Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting. Umleið 80 fólk eru í føstum starvi á stovninum.